# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*–Vit fáa ikki hjálpt teimum neyðstøddu, tí bjargingarútgerðin er við herinum í Irak*
*(guvernørurin í Kansas)*

# Bjargingarútgerðin er í Irak



*Meldurhvirlurnar javnaðu tað mesta av Greensburg við jørðina*

**Tilbúgvingin í amerikanska statinum Kansas virkar ikki, tí herurin er farin við bjargingarútgerðini**

Um vikuskiftið varð amerikanski staturin Kansas illa herjaður av meldurhvirlum, sum kravdu tólv mannalív og gjørdu stóran skaða.

Meldurhvirlurnar fóru serliga illa við bygdini Greensburg, sum er 175 kilometrar vestan fyri høvuðsbýin í Kansas, Wichita. Har doyðu tíggju fólk, og at kalla øll bygdin varð javnað við jørðina.

Men tað hevur víst seg at vera sera trupult hjá teimum ringast raktu at fáa nakra hjálp frá myndugleikunum, skrivar AP, og guvernørurin í Kansas, Kathleen Sebelius, sigur, at myndugleikarnir fáa ikki gjørt so nógv, tí herurin er farin við bjargingarútgerðini.

- Útgerðin er farin við herinum til Irak, og tað er ein stórur trupulleiki, tí nú hava vit tørv á henni her, sigur guvernørurin. Sum skilst hava bjargingarliðini ongar tyrlur og ongar lastbilar, og tørvur er eisini á aðrari útgerð.



# 18.000 lótu seg úr øllum

*Amerikanski myndamaðurin Spencer Tunick er heimskendur fyri sínar myndir av naknum fólki, men felags fyri myndir hansara er, at tær eru ikki av naknum einstaklingum, men fleiri hundrað og ofta fleiri túsund, sum hava latið seg úr hvørjum klodda. Um vikuskiftið var hann í Meksiko Býi, har 18.000 menn og kvinnur lótu seg úr øllum og lótu seg avmynda*

# Fleiri uppskot um misálit

**Ísraelska tingið skal viðgera fleiri uppskot um misálit á forsætisráðharran**

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, tvíheldur um sessin sum forsætisráðharri hóast krøv úr øllum ættum um, at hann skal fara frá eftir tær lemjandi atfinningarnar í sambandi við kríggið við Hizbollah seinasta summar.

Nú royna tey, sum vilja hava hann frá, at fáa tjóðartingið Knesset at samtykkja misálit á hann. Higartil eru minst trý misálitisuppskot løgd fyri tingið, sum ætlandi fer at viðgera tey um nakrar dagar. Uppskotini eru bæði frá høgru og vinstru.

- Meirilutin av ísraelska fólkinum vilja hava forsætisráðharran frá, og tað krevur andstøðan eisini, sigur formaðurin í Likud-flokkinum, Benjamin Netanyahu. Eygleiðarar vænta kortini ikki, at nakað av misálitisuppskotunum verður samtykt, tí stjórnarsamgongan eigur 78 av teimum 120 tinglimunum.



*Ehud Olmert fær ikki stuðul frá fólkinum, men frá politikarunum*

## STUTT SAGT

### Fyrst til Angelu

Nývaldi franski forsetin, Nicolas Sarkozy, ætlar sær til Berlin at vitja týska kanslaran, Angelu Merkel, so skjótt sum tað letur seg gera. Talsmaðurin hjá Sarkozy sigur, at skrivstova forsetans hevur longu havt samband við kanslaraskrivstovuna í Berlin, og at vitjanin ætlandi verður, so skjótt Sarkozy hevur tikið við formliga. Tað verður væntandi tann 16. mai. Eins og Angela Merkel er Sarkozy fyri tættari sambandi millum Esropa ig USA, og bæði eru ímóti, at Turkaland kemur upp í ES.

### Stillar ikki uppaftur

Forsetin í suðuramerikanska landinum Paraguay, Nicanor Duarte, segði í gjár, at hann ætlar sær ikki at stilla uppaftur, tá forsetaval verður næsta ár. Hetta er annað valskeiðið hjá forsetanum, og skal hann stilla uppaftur, má stýrisskipanin broytast, tí eftir henni kann forsetin bara sita tvey valskeið. Men Duarte ætlar sær ikki at broyta stýrisskipanina. Ístaðin fyri fer hann at styðja ráðharran í skúlamálum, Blanca Ovelans, sum verður forsetavalevni hjá stjórnarflokkinum Colorado, ið hevur havt valdið í Paraguay tey seinastu 60 árini. Einaræðisharrin Alfredo Stroessner, sum ráddi í Paraguay í 35 ár í síðstu øld, var eisini úr Colorado-flokkinum.

### Eingin náði

Týski yvirgangsmaðurin Christian Klar fekk í gjár at vita, at hann skal sita minst tvey ár afturat í Bruchsal-fongslinum. Christian Klar var limur í týska yvirgangsfelagsskapinum RAF, og í 1985 bleiv hann dømdur fimm ferðir lívlanga fongsulsrevsing fyri níggju morð og annan yvirgang. Herfyri bað hann týska forsetan, Horst Köhler, um grið, men forsetaskrivstovan kunngjørdi í gjár, at forsetin hevði havnað umsóknini. Christian Klar kann søkja aftur um tvey ár.